tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Tann ið tegir samtykkir

## *Oddagrein*

Tað sær út sum samgongan hevur tikið sær tann ikki júst lítillætna rætt til at siga, at teir, ið ikki taka undir við fullveldisætlan landstýrisins, ikki tæna føroyskum áhugamálum. Orð Høgna Hoydals og Helenu Dam á Neystabø eru ikki sørt óhugnalig, eisini sæð í ljósinum av, at skattgjaldarans pen ingur ver. Nú liggur tað rættiliga langt frá føroyskari mentan at nýta landskassans pening til at føra politiska propaganda gjøgnum umsitingina, men slík framferð er eftir øllum at døma ikki langt burturi í Føroyum í dag. Hvussu man fara at vera við øðrvísi hugsandi, um fullveldið Føroyar skal grundast á, at tey, ið ikki samtykkja, skulu tiga? Gamalt er, at tann, ið tegir, samtykkir, og júst tí fer andstøðan neyvan at lata sær lynda at skula vera kvirr, so samgongan útatil kann látast sum um alt Føroya fólk tekur undir við fullveldisætlanini, hóast veljarakanningar hava víst nakað annað.

Høgni Hoydal og samgongan hava eina veika samráðingarstøðu, tí teir ikki hava alt Føroya fólk aftanfyri seg, og ikki tí stóru andstøðuflokkarnir, ið fingu góð 40% av atkvøðunum til seinasta val, nýta sín demokratiska rætt at siga sína meining. Veika samráðingarstøðan kemst av, at kantuta støða Tjóðveldisfloksins forðar fyri tí breiðu semjuni, ið er neyðug fyri eitt slíkt mál, sum eftir øllum at døma er í Tinginum millum allar flokkar uttan Tjóðveldisflokkin. Tað sær tíverri út sum, at orðavalið hjá serliga Tjóðveldismonnum gerst meira og meira ófantaligt samstundis sum virðingin fyri øðrvísi meiningum, búskaparligum útrokningum og øðrum fellir

Uttanlandanevndin í Løgtinginum hevði Jóannes Eidesgaard úr andstøðuni sum formann, og tí skuldi møguleikarnir fyri einari breiðari semju um fullveldismálið kanska verið betur. Tíverri valdi samgongan saman við Miðflokkinum at velja ein annan formann, ið teir ivaleyst hava hildið at verið betri skikkaðan til at handfara uttanlandsmál og vísa politiskt tev. Ikki kann sigast, at valið hevur verið tað besta, men hendan samgongan hevur sum heild ikki verið tann, ið hevur útvíst best dømikraft, tá tað kemur til val av formonnum og landstýrismonnum.

Undirbrotligheitin hjá Tjóðveldismonnum kemur serliga til sjóndar við tað, at teir seta fram fyrispurningar, har teir biðja danskarar definera ríkisfelagsskapin. Á sama hátt, sum fullveldisfortalarnir uttan diskussión í Hvítubók góðtaka sjónarmiðini hjá Alf Ross og øðrum akademikarum úr donskum lærustovnum, so vilja teir heldur ikki lata føroyingar sjálvar definera, hvat teir leggja í ríkisfelagsskapin. Hví skulu Føroyingar ikki megna at gera eina skipan innnan ríkisfelagsskapin, ið verður slóðbrótandi í statsrættarligum høpi uttan nakað fortilfelli? Hví skulu Tjóðveldismenn altíð lata trælalyndið skína ígjøgnum við at biðja danskarar fortelja okkum hvat vit skulu leggja í ríkisfelagsskapin? Høgni Hoydal tosar um hjálparloysi, og spurningurin er um ikki júst slíkir fyrispurningar frá Tjóðveldismonnum til Ríkisumboðið eru tekin um hjálparloysi.

Vónandi sær samgongan, at allir føroyskir flokkar tæna føroyskum áhugamálum — eisini teir, ið hava eina loysn, ið megnar at savna meirilutan av Føroya fólki, áðrenn nøkur samráðing við donsku stjórnina fer fram. Annars meta vit sum landsstýrið, at kunning og upoplýsing eru mest týðandi tættirnir í hesum álvarsmáli. Nettupp tá er tað so ómetaliga týdningarmikið, at ikki einstakir politikarar taka sær patent uppá at definera, hvat verulig og sakligt kunning og upplýsing eru. Men málið krevur ábyrgd av bæði andtøðu og landsstýri at hugsa um, hvussu vit miðja móti at taka ábyrgdina av okkum sjálvum um somu tíð sum vit tryggja rættindi og livikor hjá teimum her búgva.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Hvør jagstrar hvønn?



Í oddagrein í Sosialinum mikudagin 2. februar verður nevnt, at tað neyvan tænir framtíðar samstarvi, um Sambandsflokkurin ger Javnaðarflokkin til skotskivu í einum og øllum.

Men so heldur oddagreinin fram:

”Hetta hava vit sæð Sjálvstýrisflokkin gera nú í eina tíð, og hetta fer ein tileinkisgjørdur Sjálvstýrisflokkur helst eisini at kenna sviðan av eftir næsta val. Ikki tí — flokkar eiga ikki undan einum vali at avskriva samstarvsmøguleikar. Men kortini má sigast, at Sjálvstýrisflokkurin hevur borið seg ómetaliga skitið og ljótt at móti Javnaðarflokkinum síðani síðsta val. Spurningurin er tí, um Sambandsflokkurin ætlar sær at halda fram at ganga í fótafetum Sjálvstýrisfloksins við tess hetz móti Javnaðarflokkinum.”

Hesi vóru orðini.

Eg man hava sovið væl og virðiliga síðan seinasta val, tí eg kenni ikki til eitt einasta dømi um, at Sjálvstýrisflokkurin skal hava ført nakran hetz móti Javnaðarflokkinum. Vit eru mong, ið hava fatað tað øðrvísi, tí tú møtir neyvan javnaðarfólki, sum ikki líður av ovviðkvæmi, tá ið talan er um Sjálvstýrisflokkin.

Men av tí at orðini omanfyri eru so grov, at tú øtast, fari eg at biðja Sosialin, sum er tann, ið kemur við ákærunum, um at útgreina, hvat tað er fyri hetzur talan er um.

Vit, sum her standa fyri skotum í alment stuðlaðum blað, hava krav uppá at fáa hesa útgreining.
Eisini rokni eg við, at Sosialurin er førur fyri at koma við dømum, sum prógva, ”at Sjálvstýrisflokkurin hevur borið seg ómetaliga skitið og ljótt at móti Javnaðarflokkinum”. Lat okkum fáa prógv á borðið, takk!
Eg fari í sama viðfangi at heita á landsnevnd Sjálvstýrisfloksins um beinanvegin at taka hetta málið upp, fyri alt fyri eitt at fáa steðgað øllum hetzi móti Javnaðarflokkinum, um talan altso er um nakran hetz.

**Erhard Jacobsen,**
**nevndarlimur í**
**Suðurstreymoyar**
**Sjálvstýrisfelag**

# Ein farri av nationalfasismu?



Eg gjørdist rættliliga illa við, táið eg upp undir síðsta vikuskifti frá almennum tíðindafundi gjøgnum fjølmiðlarnar fekk boð frá landsstýrinum: »**Nú eigur tú at velja, um tú ert í parti við føroyingum ella við donsku stjómini«!!!** Og fyri at ongin ivi skal vera um, hvat hetta merkir, so varð greitt frá, »at vera í parti við føroyingum«, tað er at taka undir við landsstýrinum í fullveldismálinum. Og »at vera í parti við donsku stjórnini«, tað er at vera í andstøðu til fullveldisætlanina hjá landsstýrinum. Hesin totaliteri hugsunarhátturin er ræðandi.

Eg eri ein av teim 32, sum eru valdir á løgting at umboða og tæna áhugamálunum hjá Føroya fólki. Og tað royni eg at gera av øllum alvi og eftir besta førimuni. Eg virki eftir mínari sannføring um, hvat ið tænir politisku, búskaparligu og samfelagsligu áhugamálunum hjá Føroya fólki. Tað er júst tí eg **ikki** taki undir við fullveldisætlanini hjá teimum trimum flokkunum, sum skipaðu landsstýri fyri skjótt 2 árum síðani. Eftir míni bestu sannføring er teirra ætlan so vandamikil og skaðilig fyri livikor og allar liviumstøður hjá Føroya fólki, at eg kenni meg noyddan til at vera ikki bert í passivari men í aktivari andstøðu til fullveldisætlanina, og ístaðin vísa á aðrar og betri leiðir at ganga til frama fyri føroyskan tjóðskap og sjálvstýri.

Tí fellur tað mær fyri bróstið sum tingmaður at vera hóttur av Føroya Landsstýri, at taki eg ikki undir við teimum ella í minsta lagi gevist við míni andstøðu og tigi, so er tað at meta sum at vera í fíggindans parti.

Hetta er ein politiskur hugsunarháttur, sum annars eyðkennir totaliterar politiskar skipanir. Hetta at landsins stjórn krevur lýdni frá øllum borgarum — krevur at øll geva seg undir ta politisku kós, sum er sett, og tolir ikki andstøðu - vísandi til tjóðarinnar hægru áhugamál. Tað er nationalfasisma.

Almennu boðini frá landsstýrinum fríggjadagin bera brá av slíkum hugsunarhátti.

**Hans Pauli Strøm,**
**andstøðutingmaður**

# Bert Høgni sær trøll á alljósum degi

Sambært Dimmalætting frá 12. februar í ár, sigur Høgni Hoydal, at nú mugu allir flokkar velja, um teir eru á føroysku ella donsku síðuni, ella um teir vilja vera uttanveltaðir. Tað politiska valið kemur aftaná!

Hetta er tað løgnasta og mest forbronglaða, eg nakrantíð havi hoyrt.

Hvat er nú tað politiska og tað ópolitiska, sum Høgni Hoydal vil hava allar politiskar flokkar at velja ímillum? Er uppritið hjá landsstýrinum politiskt ella ópolitiskt?

Hvussu skulu limirnir í uttanlandsnevndini, sum allir eru politikarar, velja ímillum tað **ópolitiska** ella at vera **uttanveltaðir** ???

**Andstøðuuppskotini eru føroysk**

Hvat billar Høgni Hoydal sær inn at tosa um føroyska ella danska síðu? Hava danir gjørt uppskotini hjá andstøðuni?

Er tað nú veruliga so gali, at Høgni Hoydal heldur seg vera meira føroying enn aðrir føroyingar?

Spell kortini at politikkur nú hevur broytt tann annars so dámliga Høgna so nógv, at hann hevur yvirhálað partamann sín, sum í bløðunum skrivar rósandi brøv um seg sjálvan, tó undirskrivað við følskum navni, tí hann skammast yvir egnar gerðir.

**Høgni Hoydal eigur útlendska uppskotið**

Um vit hugsa um uppskotini hjá Sambandsflokkinum og hjá Javnaðarflokkinum, so eru hesi tilevnaði av føroyingum líka frá A til Z. Men hinvegin finnast fleiri útlendskir fadrar til uppskotið hjá Høgna Hoydal.

Um Høgni nú so fegin vil tosa um eitt føroyskt og eitt útlendskt uppskot, ja so er avgjørt neyðugt at minna á, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin eiga tey reinu føroysku uppskotini, meðan Høgni Hoydal eigur tað útlendska, sum er bæði politiskt, ópolitiskt og uttanveltað, fyri at brúka hansara egnu orð.



**Tórshavn tann**
**12.02.2000**
**Trygvi F. Guttesen**



# Vilt tú vera við

## í Føroya fremstu KT-fyritøku?

NAVISION®
solution center



*Formula.fo hevur sín uppruna afturi í 1983, tá fyrsta felagið í koncernini, P/F Petersen & Guttesen, varð stovnað.*

*Formula.fo selir og mennir fyrisitingarligar loysnir innan fíggjarstýring og journalisering, umframt framleiðsluloysnir innan fiskivinnuna. Eisini letur Formula.fo KT-loysnir til skrivstovuna.*

*Formula.fo leggur stóran dent á at hava vælútbúgvið starvsfólk, við dagførdari vitan. Formula.fo hevur m.a. starvsfólk við Microsoft Certified System Engineer útbúgving, er einasta fullmannaða Navision Solution Center í Føroyum og eru vit eisini Siemens Qualified Partner.*

*Á Formula.fo starvast í løtuni uml. 60 fólk á íalt 1500 m², í tveimum bygningum.*

Vit hava tørv á 4 forritarum til høvuðsdeild okkara í Tórshavn. Talan er um tveir forritarar til fíggjarstýringsskipanina Navision Financials og tveir forritarar til skjalaskrásetingarskipanina DocuLive.

| Navision Financials | DocuLive |
|---|---|
| **Starvsuppgávan** verður at forrita tillagingar í standard skipanini, samstundis sum givin verður tænasta/support av verandi tillagingum. | **Starvsuppgávan** verður at veita tænastu/support til DocuLive, samstundis sum tillagingar til standard skipanina skulu gerast. |
| **Tú ert datamatikari** ella hevur arbeitt eitt drúgvt tíðarskeið við bókhalds- og fíggjarstýringsskipanum. Tú kannst bæði arbeiða sjálvstøðugt og saman í bólki. | **Tú ert datamatikari** ella hevur arbeitt innan SQL og Visual Basic. Aðrar viðkomandi royndir er sjálvandi ein fyrimunur. Tú kannst bæði arbeiða sjálvstøðugt og saman í bólki. |
| **Vit kunnu bjóða** tær eitt spennandi og fjøllbroytt starv, har tú ert við til at mynda tín egna arbeiðsdag, samstundis sum tú fært góðar møguleikar innan eftirútbúgving. | **Vit kunnu bjóða** tær eitt spennandi og fjøllbroytt starv, har tú ert við til at mynda tín egna arbeiðsdag, samstundis sum tú fært góðar møguleikar innan eftirútbúgving. |
| Løn sambært avtalu. | Løn sambært avtalu. |

Umsóknin, saman við viðkomandi prógvum og skjølum, skal sendast til **formula.fo**, postboks 1078, 110 Tórshavn og skal stílast til Fróða Magnussen, ella á teldupostadressu *starv@formula.fo* innan 1. mars 2000.

Eisini ber til at ringja til okkara á tel 311115 fyri at fáa fleiri upplýsingar um omanfyrinevndu størv.

Microsoft Certified
Solution Provider

**formula.fo**
*fremst innan KT*